VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av suðri, um kvøldið frískar hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar og hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið hósdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin regn. Um kvøldið klárar í. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinni hækkar hann upp í landnyrðing og minkar vindin nakað. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 11 stig.

Stóra haldarakappingin í Sosialinum:

Vinningar til Klaksvíkar og Glyvrar

Jaspur Innan Glyvur skal tøma Miklagarð og Ingolvur úr Klakvík sleppur á dreymaferð við nýggju Norrönu

Nú er drigið í stóru haldarakappingini hjá Sosialinum, sum vísti seg at fáa sera stóra undirtøku um alt landið. Kappingin varð skipað sum partur av 75 ára føðingardegnum hjá Sosialinum.

Hundraðtals lesarar kring alt landið, úr Sumba til Gjáar og úr Hattarvík til Gásadals luttóku í hesi spennandi kapping um ein vinning frá SMS og ein frá Smyril Line. Hepnu vinnararnir eru sum vera man uttan fyri høvuðsstaðin. Jarmund Berthelsen Innan Glyvur vann vinningin »Tøm Miklagarð«. Har skal hann í 10 minuttir fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum hann fær stundir til tó bara eina av bvørjum. Hin vinningurin, ein dreymaferð við nýggju Norrönu fyri eina familju vann Ingolf Joensen, undir Klakki í Klaksvík. Sosialurin, SMS og Smyril Line ynskja teimum hjartaliga tillukku við vinningunum.

Blaðstjórin á Sosialinum og leiðarin av Miklagarði draga hepnu vinnararnar og syrgja fyri, at alt gongur rætt fyri seg
Mynd Jonhard Hammer

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	5
Qaqortoq	7
Ammassalik	6
Saint John's	20
Halifax	17
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	11
Tórshavn	10
Lerwick	13
Aberdeen	19
London	21
Tromsø	11
Bergen	16
Oslo	–
Stokkhólm	21
Keypmannah.	20
Helsinki	21
Moskva	22
Berlin	21
Warzawa	21
Kiev	24
Bukarest	24
Paris	22
Madrid	26
Róm	26
Malorca	27
Athen	26
Malta	26
Tunis	28
Beijing	20
New Dehli	31
Bangkok	31
Jakarta	32
Sydney	22
New York	–
Miami	28
Los Angeles	27
Meksikobýur	19
Panama	28
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	14

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 985 hPa við Lofoten hvørvur eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 998 hPa sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir.



Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir suður um Føroyar og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 02/09 kl. 06⁰⁰– 03/09 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,1 mm – mált frá 02/09 kl. 06⁰⁰– 03/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 14,1 mm

VESTFALLSKYRRINDI

26. august: Mánin longst frá jørðini
31. august: Seinna kvarter
7. september: Tendring
8. september: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
4. sept	04.56	17.22	03.56	16.22	04.11	16.37	06.56	19.22	07.56	20.22	03.11	15.37	02.11	14.37	05.11	17.37	06.11	18.37	04.41	17.07	05.56	18.22
5. sept	05.49	18.16	04.49	17.16	05.04	17.31	07.49	20.16	08.49	21.16	04.04	16.31	03.04	15.31	06.04	18.31	07.04	19.31	05.34	18.01	06.49	19.16
6. sept	06.41	19.07	05.41	18.07	05.56	18.22	08.41	21.07	09.41	22.07	04.56	17.22	03.56	16.22	06.56	19.22	07.56	20.22	06.26	18.52	07.41	20.07
7. sept	07.31	19.56	06.31	18.56	06.46	19.11	09.31	21.56	10.31	22.56	05.46	18.11	04.46	17.11	07.46	20.11	08.46	21.11	07.16	19.41	08.31	20.56

5 707265 100036 >